ÓKEYPIS útkoyring í Tórshavn FÓÐURSØLAN

Kvalitetsfóður til kettur og hundar

Bílegg á telefon 50 20 22

SKYTTENs hunda- og kettufóður er framleitt síðan 1970 og inniheldur fisk og høsnarunga.

Føðurið inniheldur ikki...

- haldevni
- aromaevni
- litevni
- sojaprotein



Hundafóður 20 kg SPECIAL bert 450,-

Kettufóður 15 kg KAT bert 390,-

www.grafikmaster.fo

Tel. 50 20 22 · info@fodursolan.com · www.fodursolan.com

Lesið Sosialin -so eru tit við!

KOYRIKORT
TEORISKEIÐ - ENDURTØKA - TAXA - R.F.SKEIÐ



Sosialurin 341800

NÝTT TEORISKEIÐ

byrjar hósdagin 31. mars kl 16.00,
á Niðaravegi 11 í Søldarfirði.
Ring og melda til hjá Andreu Isaksen á tlf 211687
ella hjá Karl Rasmussen á tlf 212048.

ANDREA ISAKSEN
TEL. 211687

veitst tú ikki tað? Sosialurin



## Tímalærarar til Fiskivinnuskúlan

Fiskivinnuskúlin søkir eftir tímalærarum at byrja á skúlanum 1. august 2011 í hesum lærugreinum:

Alis-/evnafrøði C-stig (4 t/v), Evnafrøði B-stig (5 t/v) og Virkisbúskapur B-stig (6 t/v)

**Arbeiðsuppgávur:**

- undirvísa í viðkomandi lærugrein
- vera við í ráðlegging skúlans
- hjálpa næmingunum við verkætlanum

**Vit vænta, at tú:**

- hevur útbúgving frá lærdum háskúla ella øðrum hægri lærustovni
- hevur undirvísingarroyndir (fyrimunur)
- ert samstarvsfús/ur og hevur evni at leggja tilrættis
- trívist við at undirvísa og vera saman við ungdómi
- kanst motivera næmingarnar

**Vit bjóða:**

- eitt nútímans og vælvirkandi skúlaumhvørvi
- eitt arbeiðspláss í støðugari menning
- ein positivan leiðsluhugburð til næmingar og lærarar
- námsfrøðiligt innleiðsluskeið

**Setanar- og lønartreytir:**
Tímalærarar verða settir fyri eitt skúlaár í senn og verða løntir eftir sáttmálanum millum Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsóknir skulu stílast og sendast til Fiskivinnuskúlan, Fjarðarvegur 4, Postrúm 96, 350 Vestmanna. Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi týsdagin 19. apríl 2011. Umsóknarblað fæst á skúlanum ella á heimasíðu skúlans www.fiskvest.fo

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jákup Andreasen, skúlastjóra, á tlf. 424 573 ella 221 654.

FISKIVINNUSKÚLIN
Postrúm 96 · 350 Vestmanna · tlf. 424 573 · fiskvest@fiskvest.fo

*Á Fiskivinnuskúlanum ganga umleið 60 næmingar á støðisárinum innan fiskivinnu (SIF) og hægri útbúgving innan fiskivinnu (HIF). Á skúlanum eru tvey følk í føstum starvi, meðan aðrir undirvísarar eru settir sum tímalærarar. Skúlin skipar eisini fyri skeiðum t.d. innan innanetirlit og matvørutrygd.*



## SØLUFÓLK TIL FØROYAPRENT

Okkara sølutoymi skal víðkast, og tí leita vit eftir einum sølufólki/ráðgeva, sum fær sum fremsta mál at hjálpa kundum okkara at røkka teirra málum. Føroyaprent hevur sum aðalmál, at allir okkara kundar kenna seg nøgdar við arbeiði og tænastustøði á virkinum. Okkara kundar eru allastaðni í landinum, og tí fer nýggja sølufólkið at arbeiða úti ein stóran part av tíðini. Hugur og hegni at arbeiða sjálvstøðugt og evni at skapa góð sambond við onnur, eru av avgerandi týdningi fyri trivnaðin í hesum avbjóðandi starvi.

**Tað er ein fyrimunur um tú hevur :**

- eina viðkomandi útbúgving innan sølu og marknaðarføring
- hevur vitan um og royndir frá grafiskum virki
- royndir við B2B sølu

**Tað er neyðugt at:**

- tú hevur lætt við at samskifta við og skilja viðskiftafólk og starvsfelagar
- tú kennir teg trygga/-n við at tingast við viðskiftafólk – og at tey kenna seg trygg við teg
- tú hevur áræði, ert álítandi, ert nærlagdur/-løgd og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- tú dugir at raðfesta og at arbeiða við fleiri málum í senn
- tú verður motiveraður/-ur av kapping
- tú dugir at orða teg í talu og á skrift

Vit bjóða eitt spennandi starv á Føroya størsta grafiska virki. Okkara felags mál er at varðveita og styrkja menningina av grafiska yrkinum, so kundar okkara í dygd og tænastu altíð eru í góðum hondum. Vit vilja við hesum tryggja, at Føroyar framhaldandi hava eitt framkomið og kappingarført grafiskt virki.

- løn og arbeiðstreytir sambært avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Vilt tú vita meira, so ring ella skriva til Hansinu Dahl, sølu- og marknaðarleiðara, á telefon 594559, hansinadahl@foroyaprent.fo

**Umsóknarfreist 4. apríl 2011. Starvið verður sett skjótast gjørligt eftir hetta.**

Umsóknin skal sendast til:
Føroyaprent Pf.
Hoyvíksvegur 59
Boks 3118
110-Tórshavn
Merk umsóknina: Sølufólk

Føroyaprent – ger mun

Føroyaprent vil tryggja føroyingum eina kappingarføra prentsmiðju, har kundin veit, at hansara uppgáva er í tryggum hondum. Bæði innan grafiska uppseting, prent og bókaframleiðslu. Vit framleiða alt frá visitkortum og brævørkum til faldarar, bløð og bøkur. Á Føroyaprent ivast vit ikki í, at nýggjasta tøknin, góða handverkið og tær drúgvu royndirnar geva besta úrslitið. Føroyaprent er svanamerkt prentsmiðja.